UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Dagfesting: 27. mars 2023
Mál nr.: 23/01048
Málsviðgjørt: RNA

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
§ 2. Fyritøkur og einstaklingar, sum eru fevnd av § 1, skulu í sambandi við tøku av alifiski rinda avgjald til landskassan. *Stk. 2.* Avgjaldsgrundarlagið er grundað á mánaðarligu tøkuna av alifiski í kruvdari vekt, faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum í sama mánaði. *Stk. 3.* Við átekning í fíggjarlógini til inntøkujáttanina í fíggjarárinum verður ásett, hvør altjóða marknaðarprísur verður nýttur. *Stk. 4.* 1) 2) Gjaldið verður ásett soleiðis: 1) Er miðal altjóða marknaðarprísurin kr. 36 fyri kilo ella hægri, er gjaldið 5%. 2) Er miðal altjóða marknaðarprísurin kr. 32 fyri kilo ella hægri, men lægri enn kr. 36 fyri kilo, er gjaldið 2,5%.	**§ 2.** Fyritøkur og einstaklingar, sum eru fevnd av § 1, skulu í sambandi við tøku av alifiski rinda avgjald til landskassan. *Stk. 2.* Avgjaldsgrundarlagið er grundað á mánaðarligu tøkuna av alifiski í kruvdari vekt, faldað við miðal altjóða marknaðarprísinum í sama mánaði. *Stk. 3.* Við átekning í fíggjarlógini til inntøkujáttanina í fíggjarárinum verður ásett, hvør altjóða marknaðarprísur verður nýttur. *Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð tey roknskapartøl, sum alifyritøkurnar skulu lata inn, so miðal framleiðslukostnaðurin fyri hvørt hálvár kann gerast upp. *Stk. 5.* Við støði í skjali 1 almannakunnger landsstýrismaðurin hvørt hálvár, hvør miðal framleiðslukostnaðurin er.

3) Er miðal altjóða marknaðarprísurin lægri enn kr. 32 fyri kilo, er gjaldið 0,5%. *Stk. 5.* Gjald verður ikki rindað av tøku, ið landsdjóralæknin hevur álagt alara at fremja, og sum ikki kann seljast til marknaðarvirði. *Stk. 6.* Upplýsingar um mánaðarligu tøkuna av alifiski skulu innan 15. í mánaðinum aftan á tøkuna latast TAKS. Um upplýsingarnar um tøku ikki verða latnar TAKS innan ásettu freistina, verður sekt á kr. 1.000 løgd afturat tøkugjaldinum fyri avvarðandi mánað. *Stk. 7.* Tøkugjaldið fellur til gjaldingar í 4 gjøldum ávikavist 1. februar, 1. mai, 1. august og 1. oktober við gjaldfreist til 20. í mánaðinum. Verður tøkugjaldið ikki goldið rættstundis, verður renta roknað við 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum. *Stk. 8.* Landsstýrismaðurin ásetur í kunngerð, hvussu gjaldið verður rindað, eins og hann kunnar um marknaðarprísin sbrt. stk. 3.	
	§ 2 a. Gjaldið eftir § 2 verður ásett sum ásett í skjali 2. *Stk. 2.* Gjald verður ikki rindað av tøku, ið landsdjóralæknin hevur álagt alara at fremja, og sum ikki kann seljast til marknaðarvirði. *Stk. 3.* Upplýsingar um mánaðarligu tøkuna av alifiski skulu innan 15. í mánaðinum aftan á tøkuna latast TAKS. Um upplýsingarnar ikki verða latnar TAKS innan ásettu freistina, verður sekt upp á kr. 1.000 løgd afturat tøkugjaldinum fyri avvarðandi mánað. *Stk. 4.* Tøkugjaldið fellur til gjaldingar í fýra gjøldum ávikavist 1. februar, 1. mai, 1. august og 1. november við gjaldfreist tann 20. í mánaðinum. Verður gjaldið ikki goldið rættstundis, verður renta roknað við 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum.

	§ 2b. 2% av tøkugjaldinum fellur til kommunurnar. *Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ásetur nærri reglur um, hvussu inntøkan verður býtt millum kommunurnar og um útgjald.